# Húsa- Syðradals Skúli

**Postrúm 12 · 700 Klaksvík**

## Lærarastørv í Húsa-Syðradals Skúla

**Eitt tíðaravmarkað starv skúlaárið 2010/2011 við Húsa- Syðradals Skúla.**

Søkt verður eftir einum lærara til uml. 14 tímar vegna avlopstímar og tímar til serligan tørv.

**Tann, ið settur verður skal:**
- Undir ábyrgd leiðslurnar taka lut í dagliga arbeiðnum
- Duga at samstarva
- Vera fúsur at taka á seg tær uppgávur, ið eru í skúlanum
- Vera við til at menna skúlan

**Skúlanum tørvar lærara, ið m.a. kann átaka sær:**
- Svimjiundirvísing
- Handverk og list
- Náttúru/tøkni
- Undirvísing í teld
- Annars allar vanligar lærugreinir frá 1. – 7. flokk

**Førleikakrøv:**
- Læraraútbúgving
- Umsóknir við c.v. og avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu sendast saman við umsóknini

**Lønarviðurskifti:**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1-29.2.

Tann, ið settur verður, eigur at tola broytingar starvinum viðvíkjandi.

Umsóknir skulu vera skúlaleiðaranum í hendi **í seinasta lagi mánadagin 17. mai 2010, kl. 09.00.**

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til skúlaleiðaran, Sáru Mikladal, á tlf. 236665.

**Húsa- Syðradals Skúli**




# P/F Fiskaaling søkir granskara

## til verkætlan innan aling á opnum havi

Fiskaaling er farið í gongd við verkætlan innan **Aling á opnum havi.** Verkætlanin er partur av átakinum nýggj aliøki í vakstrarpakkanum hjá Vinnumálaráðnum (www.vmr.fo). Í hesum sambandi verður søkt eftir granskara til mátiarbeiði, teldumodelering og dimensioneringsarbeiði.

**Ynskiligir førleikar**
- viðkomandi útbúgving, verkfrøðingur ella líknandi
- royndir frá teldumodelering, serliga FEA-modelering
- royndir við fysiskari modelering og signal analysu
- tú hevur góð samstarvsevni
- tú ert nýhugsin og ágrýtin
- tú dugur at samskifta á enskum

Í verkætlanini verður arbeitt tætt saman við granskarum á Fiskaaling og Náttúruvísindadeildini umframt at arbeitt verður saman við granskarum úti í heimi.

Høvuðsaktiviteturin verður at gera model arbeiði í samband við at útgerð til aling á opnum havi skal mennast, og at taka lut í mátiarbeiðinum í hesum sambandi. Model arbeiði umfatar FEA modelering av rørslum í samband við streym- og alduávirkan umframt design og dimensionering av fortoyningum, ringum og nótum. Harafturat skal støddarskalerað model gerast og roynast í royndarbrunni. Neyðug upplæring verður veitt til tann partin av arbeiðinum har umsøkjarin ikki hevur førleikar.

Góður møguleiki er fyri framhaldandi granskingarstarvi umframt at partar av verkætlanini kunnu innganga í PhD-útbúgving.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Øystein Patursson á tel 214787 ella Kristian Petersen á tel 548180.

Umsókn við avritum og møguligum ummælum, skal sendast til:

**P/F Fiskaaling**
Við Áir, FO-430 Hvalvík

ella
fiskaaling@fiskaaling.fo

Umsóknin skal vera komin fram í seinasta lagi 7. mai 2010. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Fiskaaling
Aquaculture Research Station of the Faroes

P/F Fiskaaling er partafelag, har Føroya Landsstýri eigur allan partapeningin. Fiskaaling hevur virksemi við Áir, í Nesvík og í Skopun. Samlaða starvsfólkatalið er 25, herav fleiri granskarar. Virksemi fevnir um at granska, menna og ráðgeva innan aling av vatnlivandi djórum og plantum og innan biotøkni, herundir verkætlanir innan matvørugóðsku, aliumhvørvi, fóður, vatn, framleiðsluhættir, nýggj aliøkir, aling á harðbalnum økjum v.m. Meiri fæst at vita á www.fiskaaling.fo

P/F Fiskaaling | Við Áir | www.fiskaaling.fo

# Tvingsilssøla

**Týsdagin 1. juni 2010 kl. 10.30** verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir ognina matr. nr. 1365 cv, Tórshavn, sum liggur Javnagøta 5, Tórshavn.

Talan er um eini sethús í trimum hæddum.

Húsini eru innrættað soleiðis:

**Ovasta hædd (80 m²):** Trappurúm/alrúm, 2 stór kømur.

**Miðhædd (120 m²):** Vindfang, inngongd, durur, gongd, køkur/alrúm, grovkøkur, hjallur við útgongd til tún/terassu, borðstova/stova við útgongd til stóra altan/terassu, hugna-/sjónvarpsstova, baðirúm, hjúnarúm við útgongd til altan, millumgongd, baðirúm, 2 kømur, niðurgongd til niðastu hædd.

**Niðasta hædd (120 m²):** Inngongd, baðirúm, stova/kamar, goymslurúm, kamar, trappugongd, bryggers/vaskirúm/fýrrúm.

Tvingsilssølan er umbiðin av Turið Debes Hentze, adv., Tórsgøta 17, 100 Tórshavn, tlf. 311460 (sak nr. 2004018), sum kann geva nærri upplýsingar um ognina.

Advokatarnir Hentze

Tórsgøta 17 · Postboks 236
FO 110 Tórshavn
Tlf. 311460 · Faks 311490
E-mail: hentze@hentze.fo
**www. hentze.fo**


# Chesterfield sofasett

3 + 2 sofasett úr brúnum oksaleðri til sølu. Flott italienskt snið og sera góður sitikomfortur.

Nakað av sliti sæst á sofunum, og verða tær tí seldar bíliga.

**Nýprísur:** kr. 22.000 fyri settið

**NÚ einans KR. 8.900,-** fyri settið



**ÁHUGAÐ KUNNU RINGJA Á TEL. 79 30 65**



# Ert tú góður við tíni húsdjór?

**So er SKYTTENS hunda- og kettufóður rætta valið**

SKYTTENS hunda- og kettufóður er kvalitetsfóður, framleitt í Danmark síðan 1970. Fóðurið er framleitt úr fiski og hønsarunga og inniheldur ikki konserveringsevni, litevni, aromaevni ella sojaprotein.






**SPECIAL** (20 kg) Fyri posan **kr. 450,-**

**SØCLA** (20 kg) Fyri posan **kr. 540,-**

**KETTUFÓÐUR** (15 kg) Fyri posan **kr. 390,-**

www.fodursolan.com · info@fodursolan.com · Tel. 21 19 96 Ókeypis útkoyring í Havn



www.fjorukrogvin.fo




Tel. 471500 / 771500



# Lesið Sosialin